

## Friis byrjar við web-sjónvarpi

Danski Janus Friis vann sær milliardir, tá hann seldi Skype. Nú er danski ríkmaðurin til reiðar at senda joost.com á marknaðin. Talan er um sjónvarp umvegis alnetið, har brúkararnir kunnu velja millum fleiri enn 150 rásir. Allar hesar verða sendar í góðari góðsku, so veruligt breiðband er neyðugt, men hetta er ivaleyst nakað, ið mest sum hvørt húsarhald kemur at hava í framtíðini.

## Inflatión upp á 2200%

Afrikanska landið, Zimbabwe hevur í løtuni hægstu inflatiónina í heiminum. Við Mugabe við valdið er rímiliga sterka fíggjarstøðan hjá landinum farin í knús, og í dag liva umleið 80% av íbúgvunum í landinum undir fátækramarkinum. Inflatiiónin í Zimbabwe er tó á ongan hátt met. Undir sonevndu hyperinflatiónini í Týsklandi í 1929 vórðu prísirnir tvífaldaðir 49. hvønn tíma. Tað svarar til eina inflatión upp á 3.250.000%

# til seym



Juanita" til høgru, er næstan burtur, meðan "Isabella" bíðar eftir túri so hon eisini kann upphøggjast. "Starlette3" tømur "Isabella" fyri tað sum er av virði umborð, og skal eftir øllum at døma aftur til Kaliningrad við útgerðini. Tað eru somu eigarar aftanfyri Rostock-systrarnar, sum "Starlette3".

Mynd: Greenpeace/Henna Tahvanainen

út av hvør eigur skipini, og hvørki einstøk lond ella NEAFC hava tey tól og møguleikar sum skulu til fyri at finna røttu eigararnar. Truls Gulowsen sigur at tey hava roynt at seta bitarnar saman, og hava í dag eina góða mynd av hvør sum eigur trolararnar. Rostock-systrarnar hava eigarar av russiskum uppruna, men seinast trolararnir vóru skrásettir var í Georgia. Har blivu teir strikaðir fyri jól.

- Tað vit hava gravað fram vísir at russisk handilsfólk eiga trolararnar, og hetta eru tey somu sum í fleiri ár hava verið kend fyri ólógliga fiskiveiðu gjøgnum felagið Pionerskaya Ocean Fishing, sigur Truls Gulowsen.

Hann sigur at tey hava fylgt trolarunum í meir enn tvey ár.

- Vit vóna at nýggju NEAFC-reglurnar um eftirlit í havnunum gera at vit sleppa undan slíkum piratvirksemi framyvir. Havnaeftirlitini hava verið sera vánalig í hesum málinum, serliga ES-havnirnar. Bæði vit í Greenpeace og íslendska stjórnin hava fleiri ferðir roynt at fáa millum annað ES-londini til at steðga trolarunum, men einki er hent, sigur Gulowsen.

- Trolararnir eru ein hóttan móti lógligari fiskiveiðu, og ein álvarslig hóttan móti fiskastovnunum.

### Meir upphøgging

Sari Tolvanen, ið stendur á odda fyri altjóða havátakinum hjá Greenpeace, sigur at sjálvt um eftirliti nú gerst betri, so koma vit ikki uttanum at heimsins fiskifloti er ov stórur.

- Fleiri skip mugu sendast til upphøggingar, og heimsins trolarafloti má setast saman so hann passar til støddina á teimum fiskastovnunum sum vit hava, sigur Tolvanen.

# - NEAFC-samstarvi steðgar sjórænarum



*Hetta prógvar nyttuna í samstarvinum hjá NEAFC, sigur Kjartan Hoydal, skrivari hjá felagsskapinum*

**- Nú síggja vit úrslitini av okkara arbeiði við svartalistunum og samstarvinum millum limalondini, sigur skrivari í NEAFC, Kjartan Hoydal.**

FISKIVINNA
*Jógvan H. Gardar*

**Oslo:** Kjartan Hoydal hevur staði á odda fyri arbeiðnum hjá NEAFC-skrivstovuni og limalondunum móti ólógligu veiðuni í NEAFC-økinum – landnorðingspartinum av Atlanshavinum.

- At vit nú fáa upplýsningar um at seks trolarar eru á veg til upphøggingar, meðan aðrir verða hildnir aftur í NEAFC-havnum, vísir okkum at vit nú síggja úrslitini av arbeiðnum móti ólógligu veiðuni, sigur Kjartan Hoydal.

- Nýggja havnaeftirlitisskipanin sum NEAFC kom við 1. mei í bardaganum móti ólógligum, ikki skrásettum og ikki skipaðum fiskiskapi í norðurhøvum er ein týdningarmikil sigur móti piratunum, sigur norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen.

### Væl nøgdur

- Vit eru sera væl nøgd við at teir fyrstu seks sjórænararnir eru á veg til upphøggingar. Upphøggingin loysir ein stóran trupulleika í Irmingarhavinum og hevur vakt ans nøgva staðni, sigur Kjartan Hoydal. Tey hava fingið nógvar fyrispurningar um arbeiði seinastu dagarnar.

- NEAFC og limalond okkara síggja hetta sum eitt ógvuliga gott úrslit av tí svartalista vit hava havt í gongd síðan 2004. Vit kunnu vísa til sera góð úrslit av okkara arbeiði, sigur hann.

- Gjøgnum kanningar og innheintan av upplýsingum hevur NEAFC eitt umfatandi tilfar um svartlistaðu skipini og hvør stendur aftanfyri tey, sigur Kjartan Hoydal, og leggur afturat at vert er at merkja sær, at russiskir myndugleikar hava havt ein stóran leiklut í tí loysnini sum nú liggur á borðinum.

NEAFC hevur arbeitt við at fáa steðga virkseminum hjá trolarunum og ikki minst roynt at forða fy-ri at eigararnir halda fram við virkseminum.

- Tað er sera gott at vita at seks av trolarunum nú eru undir upphøgging, eftir at hava verið hildnir aftur í NEAFC-havnum. Harafturat vera níggju aðrir trolarar og frystiskip hildin aftur í NEAFC-havnum. Umframt at fimm onnur skip ikki longur eru í Norðuratlantshavinum, sigur Hoydal.

### Stórar mongdir

Tað hevur verið ringt at meta um hvussu stórar mongdir av kongafiski hesir ólógligu trolararnir hava fiska. Men kongafiskastovnurin í Irmingarhavinum hevur verið í minking, og roynt verður at avmarka veiðuna. NEAFC-londini hava sett eina kvotu, men eingin hevur vita hvussu nógv sjórænararnir hava fiska.

Ein lítil ábending um at mongdirnar eru stórar vísir ein kanning í Hong Kong, sum NEAFC bað um.

- Landingarnar hjá tveimum frystiskipum í Hong Kong, sum høvdu tikið fisk frá hesum skipum í fjør, vóru eftir kanningar hjá kinesiskum myndugleikum mettar til millum 10.000 og 11.000 tons í livandi vekt. Loyvda veiðan var umleið 60.000 tons, meðan hon í ár er 41.000 tons. So talan er um stórar mongdir, sigur Kjartan Hoydal.